# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Góð ráð um fólkaskúlan

Hóast PISA kanningin sjálvandi hevur sínar veiku síður, eins og flestu kanningar hava tað, so liggja Føroyar so niðarliga, at einki er at ivast í, at føroyski fólkaskúlin er eftirbátur í mun til tey lond, ið liggja ovarliga. Orsøkirnar kunnu vera ymiskar, men tað skerst ikki burtur, at Føroyar er eitt tað landið í heiminum, har børn fara síðst í skúla. Nærum alla aðra staðni byrjar skúlagongdin tað árið børn fylla 6 ár ella áðrenn tað. Lítið er at ivast í, at hetta hevur nakað at siga.

Hví ikki gera sum í onkrum grannalandi, har børn fara í skúla sum 6 ára gomul og hava so 10 ára tvungna skúlagongd? Tað er bara ein forskjóting í mun til okkara skipan. Ein slík loysn burdi ikki merkt tað stóra í pengum, tí vit hava sum er eina fólkaskúlaskipan við 10 árgangum. Gamaní er tíggjunda árið ikki fyri øll, men við einari 10 flokka skipan frá 6 ára aldur, vildi tað ikki merkt so nógv annað enn ein justering av pensumi. Harafturat eru tey flestu 6 ára gomlu frammanundan í onkrum slag av almennari røkt, so har verða pengar spardir, um skúlabyrjan verður eitt ár fyrr. Alt í alt er uppskotið hjá Jógvan á Lakjuni um at byrja skúla sum 6 ára gomul eitt skilagott hugskot, sum sjálvsagt ikki loysir allar trupulleikar í fólkaskúlanum, men er eitt stig á rættari leið. Onnur átøk skulu sjálvandi til, so sum styrkjan av fakligheitini við t.d. eftirútbúgving av lærarum og kanska meiri spesialisering hjá tí einstaka lærarnum.

Tað er eitt álvarsmál, tá ein partur av okkara ungdómi kann karakteriserast sum funktionellir analfabetar. Hetta álvarsmál krevur álvarstiltøk, tí vit gera ongum eina tænastu við at lata sum einki ella halda áfram í sama spori. Tað er landspolitisk undanstøkking at tosa um at leggja tann frammanundan kroysta fólkaskúlan út til kommunurnar at umsita. Kommunurnar hava t.d. ikki megnað at loyst barnaansingartrupulleikan nóg skjótt og á nøktandi hátt. Gamaní hava summar kommunur dugað betri enn aðrar, og tað er júst her vandin við fólkaskúlanum liggur. Vit kunnu ikki forsvara, at standardurin í fólkaskúlanum skal variera, alt eftir hvørt tað er henda kommunan ella handa kommunan, ið umsitur einstaka skúlan. Hvussu skal t.d. ein kommuna, ið ikki eingongd klárar at bjóða barnaansing í hálva tíð, klára at umsita ein fólkaskúla, sum krevur fleksibilitet og framhaldandi menning?

Okkara ráð skulu vera at hava ein fólkaskúla, sum verður umsitin av landinum við hægstu landspolitisku raðfesting tey næstu árini. Tað er gjøgnum útbúgving, at okkara framtíð skal tryggjast her á landi, og um fólkaskúlin er fundamentið, ikki er nóg góður, so kunnu vit spara okkum at tosa um hægri útbúgvingar og granskingarparkir.

**Sosialurin**

## Trupult at fáa kvinnur á listarnar til løgtingsval



Val

**EYÐGUNN SAMUELSEN**
Javnaðarflokkurin

At tað er trupult at fáa kvinnur at stilla upp til val yvirhøvir, er ikki nakað nýtt. Hóast hetta, so eydnaðist tað fleiri flokkum, Tjóðveldinum, Javnaðarflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum at fáa javnstøðu á sínar listar til fólkatingsvalið og tað er gleðiligt. At tað gevur fleiri atkvøður til kvinnurnar, tá ið fleiri kvinnur eru á listanum, vísti seg eisini til fólkatingsvalið. Í áðurnevndu flokkum fingu kvinnurnar ávikavist 28,6, 36,4 og 19,6 prosent av samlaðu atkvøðunum hjá hesum flokkum . Hetta hóast fleiri mannligir atkvøðuslúkar eisini vóru á hesum listum (Høgni Hoydal, Jóannes Ejdesgaard, Kári á Rógvu).

**Lokalfeløgini**
Enn er tað so, hóast Føroyar eru eitt valdømi, at tað eru lokalu feløgini ið royna at fáa fólk á listarnar. Mín meting er, at tey verðuliga hava roynt at fáa kvinnur at stilla upp tí tey ynskja fleiri kvinnur á listarnar. Hvat er so trupulleikin. Trupulleikin hevur nakað við tey mynstur, ið okkara samfelag, er skipað eftir. Kvinnur hava ikki verið eggjaðar at halda seg framat nakrastaðni í samfelagnum, tí okkara mentan og hugsunnarháttur hevur í nógv ártíggju verið, at tað natúrliga er maðurin, ið stendur fram. Hetta er við at broytast, tíbetur, men úrslitini av hugburðsbroytingum vísa seg ikki eftir einum degi, ella nøkrum mánaðum.

**Fastar valevnislistar**
Tá ið ein arbeiðsgevari lýsir eftir fólki við einum ávísum førleika, og ongin umsøkjari fast við hesum førleikum, so ferð arbeiðsgevarin at hugsa, hvat hann kann gera ørðvísi fyri at fáa tey starvsfólk hann ynskir sær.

Júst soleiðis mugu politisku flokkarnir eisini hugsa. Vilja teir verðuliga hava kvinnur á listarnar og inn á ting, so má hátturin at fáa valevnir broytast ella umleggjast. Eitt hugskot er, fastir valevnislistar, tað vil siga at fólk vera biðin uppá listan dagin eftir valið, so at siga. Hetta ger, at eitt valevni hevur góða tíð at læra seg at vera politikari. Flokkarnir kunnu miðvíst skúla teirra valevni og ongin nýtist at vera bangin fyri at stilla upp. Hetta hevði ikki bara bøtt um møguleikarnir fyri javnstøðu, men eisini bøtt um umstøðurnar hjá øllum, ið stilla upp. Eitt valdømi setur størri krøv til floksarbeiði enn higartil, so eisini á tann hátt hevði tað verið ein fyrimunur, við føstum valevnislista.

**Meðan vit bíða**
Um vit yvirhøvur skulu koma nakran veg á javnstøðuleið so mugu vit ikki seta okkum afturá og bíða til hugburðurin er broyttur. Halda vit uppat at fokusera á kvinnur og teirra luttøku í politikki, so hendir onki, heldur ongin hugburðsbroyting. Tí heiti eg inniliga á lokalfeløgini, ið ikki eru liug at stilla upp, um framhaldandi at royna at fáa kvinnur at stilla upp, og eg vóni at fleiri kvinnur vilja lata seg stilla upp.

Eisini krevur tað at veljarin, kvinnur sum menn royna at stuðla teimum kvinnum ið stilla upp, so umboðanin innan tinggátt verður betur enn í dag. Tí koma vit framhaldandi at hava undir 10 % av kvinnuumboðanini á tingi, so ferð hetta at seinka menningini av javnstøðuni og fólkaræðinum og tað kunnu vit ikki liva við í 2007.

## Bjarni Djurholm vanvirðir fiskimannin og løgtingið



Val

**HEIDI PETERSEN**
Tjóðveldi

Tað eru reinar undanførslur Bjarni Djurholm nýtir í Útvarp Føroya, tá hann smýgur sær uttanum samtyktunum á Føroya Løgtingið um at skipa fyri at lógirnar hjá ALS skulu broytast soleiðis at fiskimenn kunna fáa útgjald úr ALS, tá skip teirra liggur óvirkið.

Undanførslur um at "so koma onnur eisini og vilja hava tað sama" Onnur fáa tað sama, eftir galdandi reglum, men fiskimenn fáa tað ikki, tað er trupulleikin.

Longu 28. apríl 2006, samtykti Føroya Løgting, við 27 atkvøðum fyri og ongari ímóti, at heita á landsstýrismannin í vinnumálum um at virka fyri, at funnin verður ein loysn upp á trupulleikarnar hjá fiskimonnum at fáa útgjald frá ALS, tá skip teirra liggur óvirkið.

Tá onki hendi í málinum var enn ein roynd gjørd av Kára P. Højgaard 28. november 2006, har Tjóðveldið tók fult undir við honum, í eini roynd at bøta um korini hjá fiskimonnum.

Landsstýrismaðurin fylgir ikki samtyktunum løgtingið hevur álagt honum, og er hetta fyrst og fremst ein rein vanvirðing av føroyskum fiskimonnum, harumframt er hetta ein háðan móti demokratiskum mannagongdum í landinum, har tað er Føroya Løgting sum ásetir hvat landsstýrið skal útføra í verki.

So niðurstøðan er greið, tað er politiski viljin frá landsstýrismanninum í vinnumálum, sum vantar í hesum málið, onki annað.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo

ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.